# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

# San Fransisco hóttur



*Minst 3.000 fólk doyðu, og stórir partar av San Fransisco vórðu javnaðir við jørðina í tí stóra jarðskjálvtanum í 1906. Nú siga amerikanskir jarðfrøðingar, at teir eru vísir í, at Kalifornia fær ein harðan jarðskjálvta innan 30 ár. Tað, sum hendi í 1906, kann henda aftur.*

# Sami politikkur hjá Berlusconi

**Politiskir eygleiðarar í Italia vænta, at Silvio Berlusconi fer at venda aftur til politikkin, sum hann rak seinast**

Italsku veljararnir hava aftur valt Silvio Berlusconi og hansara mið-høgrasamgongu at stjórna landinum. Samgongan vann í báðum tingdeildunum og kann tí stýra uttan at stúra fyri andstøðuni.

Hetta er triðju ferð, at italski forsætisráðharrin eitur Silvio Berlusconi.





*Fyri triðju ferð kann tann nú 71 ára gamli Silvio Berlusconi kalla seg italskan forsætisráðharra*

*(Mynd: Polfoto)*

Fyrst var hann forsætisráðharri eitt skifti í 1994 og so aftur valskeiðið frá 2001 til 2006. Politiskir eygleiðarar siga, at tað var ein sera dyggur smeitur fyri Berlusconi, at hann tapti ímóti Romano Prodi í 2006. Men hann lovaði sínum veljarum at koma afturíaftur.

Eygleiðarar vænta, at Berlusconi fer at taka uppaftur táttin, sum hann var í ferð við, tá hann misti takið í 2006, og í hesum sambandi hevur tað avgerandi týdning, at hann hevur meiriluta í báðum tingdeildunum aftan fyri seg. Tað hevði Romano Prodi ikki, og Berlusconi hevur ikki dult, at tað frøddi seg, tá Prodi noyddist at leggja frá sær.

Undir valstríðnum hevur Berlusconi lovað veljarunum skattalætta og at skeraja tær almennu útreiðslurnar munandi, og eygleiðarar halda, at tað vóru hesi lyftini, sum tryggjaðu honum sigurin. Italski búskapurin er í kreppu, og nógvir italiumenn kenna seg hava trupulleikar í gerandisdegnum, skrivar NTB.

# Mammurnar vilja hava børnini aftur

**Mammurnar at teimum 416 børnunum, sum vórðu tikin frá einari víðgongdari sekt í Texas, vilja nú hava børnini útflýggjað**

Tann 3. apríl tóku myndugleikarnir í Texas seg inn á garðin hjá einari víðgongdari mormonarasekt og tóku tey 416 børnini við sær. Mammurnar sluppu við, men nú hava myndugleikarnir víst teimum burtur, og tað hevur fingið mammurnar at fara til dómsvaldið fyri at fáa børnini aftur.

Myndugleikarnir siga, at teir tóku børnini, tí at sektin loyvum manni at hava fleiri konur, og at hon eisini loyvir, at børnini verða kynsliga misnýtt. Hesum vísa mammurnar aftur, og tær hava nú vent sær til guvernørin í Texas fyri at fáa børnini útflýggjað.

Málið ímóti sektini byrjaði, tá ein 16 ára gomul genta greiddi myndugleikunum frá, at hon hevði verið fyri ágangi, og at sektin hevði noytt hana at gifta seg við einum 50 ára gomlum manni.



*Kvinnurnar hava kært myndugleikarnar fyri guvernørinum*

*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Fáa aftur brenni

Ísraelsku myndugleikarnir siga nú, at teir eru sinnaðir at lata palestinska fólkið í Gazageiranum fáa brennievni aftur, eftir at steðgur hevur verið í flutninginum síðani í síðstu viku. Steðgurin hevur millum annað ávirkað el- og gassveitingina, men sambært ísraelska verjumálaráðharranum, Ehud Barak, koma viðurskiftini aftur í rættlag í morgin. Hann legði tó afturat, at bileigarar í Gaza fáa framvegis ikki benzin, so teir nógvu bilarnir, sum standa ymsastaðni í gøtunum í Gaza býi, tí at tangin er tómur, verða standandi.



*Tómar gassfløskur í Gaza*

*(Mynd: Polfoto)*

### Fáa sand úr Sahara

Sera heit luft, sum rekur úr Norðurafrika norður um Miðjarðarhavið, hevur sent hitamátararnar á griksku oynni Kreta upp um 30 stig. Hetta er óvanliga nógv har so tíðliga á árinum. Eitt nú vóru 33 stig í Iraklion, sum er á Kreta, og í Adena í Turkalandi var uppaftur heitari, tí har komu hitamátararnir upp á heili 37 stig, skrivar Reuters.

Men luftrákið hevur ikki bara hita við sær. Tað er eitt lágtrýst miðskeiðis yvir Miðjarðarhavinum, sum er orsøk til rákið, og á eystursíðuni á lágtrýstinum tekur tann heita luftin sand og dust frá Saharaoyðimørkini við sær norðureftir. Hetta sæst týðiliga á luftini í Athen í gjár. Luftin var reydlig á liti, og myndugleikarnir mæltu eldri fólki og børnum til at halda seg innandura.